# TAÐ ER TÍÐIN

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## Clara Sofie vitjar í Føroyum

Songkvinnan Clara Sofie verður hetta vikuskiftið at hoyra í Føroyum.

186 sentimetrar høga songkvinnan hevur havt stórt hitt við sanginum Når Tiden Går Baglæns. Sangin hevur spælt inn saman við Rune K, sum er dj.

Clara Sofie er cand. Mag í mentan frá Københavns Universiteti.

– Tað skelti eg ikki so nógv við. Eg havi lisið, tí tað var gott at fáa íblástur, og tá ið tað ikki er so nógv at gera við tónleikinum, er tað gott at hava Faucault at koma upp til um morgunin, sigur Clara Sofie.

Í Danmark er hon tó fyrst og fremst kend sum songkvinna, og hetta vikuskiftið kann hon upplivast í Føroyum. Hon verður at hoyra í All-in í Klaksvík og á Rex í Havn leygarkvøldið.

Fríggjakvøldið er hon gestasangari í X Factor finaluni í Danmark.

## Súkklan verður gjørd úr nylonpulvuri

Felagsskapurin E European Aeronautic Defence and Space Company (EADS) hevur framleitt eina súkklu úr nylon. Og hetta hevur fingið fleiri at spíla eyguni upp. Tað verður roknað við, at roydin hjá EADS gevur mót um, at førur í framtíðin kunnu framleiðast úr nylonpluvuri. Fyrimunurin við tí er, at tað er sera lætt tilfar, sum krevur lítið viðlíkahald, men tilfarið er sterk sum stál og aluminium. Sagt verður, at nylonpulvuri kann fara at kollvelta framtíðar framleiðslu av brúkslutum.



## Slankikururin endar kl. 15:23

Granskarar halda seg hava funnið fram til, nær á degnum á slankikururin hjá fólki vanliga endar. Og niðurstøðan, at tað er seinnapartar – klokkan 15:23 fyri at verða neyvari. Granskararnir í Bretlandi siga, at tað er sera trupult hjá fólki at halda seg frá góðgæti og kakum, tá ið tað líður út á seinnapartin. Av 1250 fólkum, sum vóru við í kanningini, mistu 62 prosent av fólkunum disiplinina í slankikurinum seinnapartar – og tá ið klokkan nærkast hálvgum fýra stendur so nógv á fólki, at tey flestu falla fyri freistingini tá.



## Tey tjúkku eru glaðari

Granskarar á Doshisha Universitetinum í Kyoto í Japan siga, at glað og væl nøgd fólk í størri mun enn vanligt eru tjúkk fólk. Granskararnir kannaðu og fylgdu fólkum í eitt hálvt ár, meðan fólk royndu at tapa seg, og tað vísti seg, at fólk, sum eru glað, taptu seg minst. Sambært granskarunum kemur hetta av, at tey í størri mun njóta lívið og leggja minni í vekttrupulleikar.



UMMÆLI: Inna Törnroos




## 100 ára gamal Forrest Gump

Tá Jonas Jonasson sat í biografstólinum og »The End« skelti í filminum Forrest Gump var víst, bannaði hann innantannað

– Tey hava stolið mítt hugskot.

Hann bíðaði nøkur ár – gjørdist millióningur við at seta pening í KT-fyritøkur – og fór síðani undir at skriva »Den hundredårige der kravlede ud ad vinduet og forsvandt«.

Søgan um Forrest Gump og Allan Karlsson líkjast í bygnaði, og høvuðspersónarnir eru báðir við í nógvum søguligum hendingum. Men meðan Forrest Gump er amerikanari, er Allan Karlsson svenskari.

Sum heitið á bókini fortelur, byrjar bókin við, at Allan fyllir 100 ár, og nakran føðingardag tímur hann ikki at halda. Hann letur vindegað á ellisheiminum, har hann býr, upp og gleivar út um og fer til gongu. Mál hevur hann onki við gongutúrinum. Hann kemur til busstøðina og sigur við bilføraran á einum tilvildarligum bussi: Koyr meg so langt, sum 50 krónur røkka.

Allan hittur bæði ein og annan á ferðini, og parallelt verður søgan um hansara ungdóm og starvslív lýst. Allan hevur upplivað nógv í sínum langa lívi, og hann hevur hitt persónar sum Winston Churchill, Harry S. Truman og Mao.

Allan gevur sær ikki far um tað, ið hendir rundan um hann. Politikki hevur hann ongantíð verið áhugaður í, men hóat tað, er tað er hann, ið av tilvild gevur USA loysnina til atombumbuna - og lívið áfram, sum um einki var hent.

Alt hetta verður sagt frá í einum skemtiligum tónalagi, og Allan er, júst sum Forrest Gump, ein lættur persónur at elska.

Um tú er troytt av at lesa bøkur, har tú longu á síðu 10 kanst rokna út, hvat endin á bókini verður, skal tú lesa hesa bók. Her er onki, sum tað plagar at vera, og eg giti mær til, at tað er tí, at hendan bók er so nógv lisin.

Høvundin Jonas Jonasson er sjálvur bilsin yvir, at so nógv dáma hansara søgu, og eftir at bókin leingi hevur ligið hægst á listunum yvir mest seldu bøkur, er tíðin nú komin til filmin um Allan.

★★★★★☆